LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 2. mars 2018
J.Nr.: LUM-10- 18/00020-10
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi klaguni frá A, dagfest 9. januar 2018**

Í klaguni varð greitt frá, at klagarin tann 9. oktober 2017 sendi Heilsu- og innlendismálaráðnum eina kæru um, at Umhvørvisstovan hevði heimilað B at leggja aliringar út fyri Víkar í Vágum, uttan at nøkur umhvørvisgóðkenning varð lýst alment, so sum ásett er sambært umhvørvislógini.

Í klaguni varð eisini greitt frá, at Umhvørvisstovan hevði tann 29. november 2017 alment lýst nevndu umhvørvisgóðkenning við eini kærufreist upp á 4 vikur.

Klagarin undraðist tó á, at Heilsu- og innlendismálaráðið ikki hevði givið sær svar upp á kæruna. Hann vísti eisini á, at hann hevði heldur ikki fingið nakra móttøkuváttan, og hóast hann í desember 2017 fleiri ferðir hevði rykt pr. telefon eftir svari, og aftur í januar 2018, so fekk hann einki svar. Tó hevði klagarin fingið eina móttøkuváttan frá Heilsu- og innlendismálaráðnum, tá hann 11. desember 2017 sendi eina skrivliga áminning um málið.

Ráðið hevði heldur ikki ringt aftur til hansara, hóast klagarin tann 3. januar 2018 fekk at vita, at deildarstjórin fór at ringja til hann, tá hann um nakrar dagar kom aftur til arbeiðis.

Tann 15. januar 2018 bað eg Heilsu- og innlendismálaráðið um eina frágreiðing um málið og um skjølini í málinum.

Tann 2. februar 2018 sendi Ráðið mær avrit av svari til klagaran upp á kæruna um manglandi umhvørvisgóðkenning, dagfest 1. februar 2018, og 5. februar 2018 sendi Heilsu- og innlendismálaráðið mær frágreiðing um málið. Í frágreiðingini skrivar Ráðið :

> “ Heilsu- og innlendismálaráðið fekk kæruna sendandi 9. oktober 2017. Kærarin sendi ikki kæruna til Umhvørvisstovuna (US), men beinleiðis til Ráðið. Mett var, at tað ikki var neyðugt at biðja US um viðmerkingar, tí FNU hevði sent líknandi kæru, og vóru tí viðmerkingarnar hjá US til kæruna hjá

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

> FNU nýttar eisini í hesa kæru. Tann 24. november 2017 broyttist grundarlagið fyri kæruni, tí US lýsti nýggja umhvørvisgóðkenning fyri aliloyvi C-20 og aliøkini A-83 í Sørvágsfirði og A-14 á Víkum.
>
> Málsviðgerðin í ráðnum hevur verið óneyðuga drúgv, men vegna stóra arbeiðsbyrðu og sjúku hevur avgreiðslan av kæruni drigið út "

Tá klagarin, eftir at eg sendi klaguna til Heilsu- og innlendismálaráðið, hevur fingið svar frá Heilsu- og innlendismálaráðnum, og Umhvørvisstovan alment hevur lýst umhvørvisgóðkenningina, geri eg ikki meira við tann partin av klaguni.

Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur almennur myndugleiki eitt nú at vátta móttøku av kæruskrivi frá einum borgara, at svara rykkjarum og kunna borgaran um, nær hann kann vænta eina avgerð í sínum máli.

At Heilsu- og innlendismálaráðið ikki letur klagaranum móttøkuváttan fyri kæruna og ikki kunnar klagaranum um, nær málið kann væntast avgreitt, tá klagarin ringir ella sendir skrivliga áminning um málið, er ikki nøktandi. Tað er heldur ikki nøktandi, at Heilsu- og innlendismálaráðið ikki ringir aftur til klagaran, tá hetta er lovað klagaranum.

Samanumtikið haldi eg, at Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ikki handfarið kærumálið á ein nøktandi hátt.

Eg fari tí at geva Heilsu- og innlendismálaráðið eina átalu fyri handfaringina av málinum.

Burtursæð frá hesum, geri eg ikki meira við málið.

Avrit at skrivinum er sent til klagaran, og skrivið verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara í navnleysum líki.

Vinarliga

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður